# Vegleiðing til uppsetan av telduposti – Mac

Við telduposti frá Føroya Tele hevur tú møguleikan at leggja teldupostin inn á teldu og telefon. Her er ein vegleiðing til hvussu tú gert tað á eini teldu við macOS. *Vegleiðingin er gjørd við stýrisskipanini macOS High Sierra 10.13.6 - møguliga líkjast valmøguleikarnir ikki.*

Tendra **Mail**



Um tú longu hevur onkran teldupost brúkara á telduni, trýst so á **Mail** og vel **Tilføj konto…**



Síðani kemur hetta vindeygað fram.

Tað kemur eisini fram, um hetta er fyrstu ferð, at tú brúkar **Mail** programmið.

1. Vel **Anden Mail-konto…**
2. Trýst á **Fortsæt**



Skriva tínar upplýsingar inn soleiðis:

1. Navn
2. Teldupost addressa
3. Loyniorð



**IMAP Uppseting**

Fyri at seta teldupostin upp við **IMAP**, skalt tú:

1. Skriva teldupostin hjá tær í **E-mailadresse**
2. Skriva teldupostin hjá tær í **Brugernavn**
3. Skriva loyniorðið hjá tær í **Adgangskode**
4. Vel **IMAP** undir **Kontotype**
5. Skriva **imap.olivant.fo** undir **Server til indgående post**
6. Skriva **smtp.olivant.fo** undir **Server til udgående post**
7. Trýst á **Log ind**




**POP Uppseting**

Tað er eisini møguligt at brúka **POP** skipanina, og har gert tú tað sama í stigi 1, 2, 3 og 6.

Stig 4 og 5 verða gjørd soleiðis:

4. Vel **POP** undir **Kontotype**
5. Skriva **pop.olivant.fo** undir **Server til indgående post**

Trýst síðani á **Log ind**



**IMAP**

IMAP er í stuttum ein skipan, sum goymir teldupostarnar á servaranum. IMAP skipanin synkroniserar alt til servaran, so teldupostarnir og mappurnar altíð eru tøkar hjá øðrum eindum at taka niður. Hetta er hent, um tú ætlar tær at lesa post á fleiri eindum, so sum telefonini og telduni. Trupulleikin við IMAP er, at um man ikki regluliga strikar teldupostar, verður goymsluplássið skjótt uppi.

Vit viðmæla **IMAP** skipanina

**POP**

POP skipanin tekur teldupostarnar niður á telduna, og tú hevur møguleika at goyma eitt avrit av teldupostinum á servaranum. POP skipanin er baserað á at brúka so lítið av plássinum á servaranum sum gjørligt. Hendan skipanin er sera góð, um tú bert skalt lesa teldupost á einari eind – tú kanst tó seta POP skipanina upp til at rigga saman við fleiri eindum. Hetta gert tú við at goyma eitt avrit av hvørjum telduposti á servaranum í longri ella styttri tíð, so aðrar eindir kunnu taka hesar teldupostar niður. POP dugir ikki at synkronisera mappur o.a.